


# BSV altíð góðir í ráðum

**BSV Bygningssnikkaravirkið er eitt fjølbroytt virkið, ið tilevnar bæði stórt og smátt, júst eftir ynski og tørvi hjá kundanum**

Síðani byrjanina í 1973 hevur BSV Bygningssnikkaravirkið gjørt umleið 25.000 uppgávur, bæði smáar og stórar.

Virkið byrjaði undir navninum Snikkaravirkið í Stoffalág. Í 1980 flutti virkið í bygningin á Smyrilsvegi og broytti tá navn til P/F Bygningssnikkaravirkið BSV. Vilhelm M. Johannesen var stjóri hesi árini, men lat hann í 2007 sessin frá sær, og tá tók sonurin Helgi Johannesen við sum stjóri. Helgi hevur starvast á BSV frá tí hann byrjaði í læru 01 juni 1982, burtursæð 3 ½ ár í Danmark har hann tók útbúgving sum byggifrøðingur.

Talan er um eitt virki, ið er sera fjølbroytt, og har vitan og handverk sameinast. Eisini er BSV altíð til reiðar við skikkaðari ráðgeving og hugskotum.

## Alt

BSV hevur serframleitt innbúgv, og eru mong dømi um tað kring landið, nevnd kundu verið mong dømi hesi 36 árini, virkið hevur verði til, hetta kann síggjast inni á heimasíðuni bsv.fo. BSV leggur seg nevniliga eftir at framleiða júst tað, ið tørvur er á.

Úr rúgvuni av framleiðslum kunnu nevnast úthurðar, trappur, handilsinnbúgv, vindeygu, køkar, matstovuinnbúgv, skeltir. Stutt sagt stórt og smátt.

Umframt er eisini talan um handil, ið selur allar vørur, ið hoyra til í slíkum handli. Vert er kanska at nevna elektronisku lásaskipanirnar.

## Heimasíða

BSV er til fyri kundan og framleiðir tað, ið kundin hevur tørv á. Nýggj tænasta hjá BSV er nýggja og væl útbygda heimasíðan, har vitan fæst um virkið, og ikki minst um dygdargóðu framleiðslurnar. Myndir eru av ymsum, ið BSV Bygningssnikkaravirkið hevur framleitt fyri kundar, og innlit fæst í vøruúrvalið.

Og sjálvsagt ber eisini til at koma í samband við BSV Bygningssnikkaravirkið umvegis heimasíðuna bsv.fo











